*Tann besta upplivingin hjá einum gyklara er, tá hann fær áskoðararnar at halda, at teir hava funnið útav triksinum. Men tá til stykkis kemur er loysnin ein heilt onnur*



– *Tað besta hjá einum gyklara er at fáa fólk at halda, at tey hava funnið út av triksinum – og so er tað als ikki tað sama, sigur Rógvi*

sær eina við, at tey vaksnu eisini fáa nakað burturúr.

Tá hann fer á pall hevur hann eina ætlan í høvdinum, men tað er ikki altíð at hon verður fylgd fullkomuliga.

Tá Smyril Line skipaði fyri gospeltúrinum var hann fleiri ferðir á palli. Tí hevði hann heldur styttri framførslur og hevði altíð nógv nýtt tilfar við hvørja einastu ferð.

– Tann besta upplivingin hjá einum gyklara er, tá hann fær áskoðararnar at halda, at teir hava funnið útav triksinum. Men tá til stykkis kemur er loysnin ein heilt onnur, sigur Rógvi, og nevnir triksið við ketsjuppdunkinum sum eitt slíkt triks.

**Nýggj triks**

Aðrir gyklarar hava sínar fyrimyndir, men hjá Rógva er øðrvísi: Hann hevur fyri sovítt onga serliga fyrimynd tá hann stendur á palli.

– Tað finnast nógvir stórir gyklarar úti í heimi, men eg havi onga fyrimynd soleiðis beinleiðis, greiðir hann frá.

Ein danskan gyklara, Rune Klan dámar honum væl. Hann hevur ein serstakan máta at skipa framførslur sínar, ið serliga venda sær til ung og vaksin.

Felags fyri allar gyklarar er tó tað, at neyðugt er at venja hvønn einasta dag.

– Fái eg eitt nýtt triks, so venji eg tað nógv inntil eg dugi tað. Eg kann so framføra tað nakrar ferðir, og leggi tað síðani á hillina eina tíð.

– Skal eg taka tað framaftur, dugi eg tað, men skal líka fríska tað uppaftur.

Ein útlendskur gyklari kann saktans koyra við somu framførsluni í fleiri mánaðir og enntá í ár, meðan hann ferðast lond og ríki runt. Hinvegin so má ein føroyskur gyklari duga ein hóp av triksum.

– Tað er so skjótt at koma runt til tey somu støðini, har fólk hava sæð tað einaferð fyrr.

– Tú mást snøgt sagt duga ræðuliga nógv triks. Tað ber ikki til at hava eina ávísa framførslu í alt ov langa tíð ísenn.

# Ikki peningur í

Hásesong hjá einum gyklara sum Rógva er uppundir jól og um summarið, tá stevnur og onnur tiltøk eru á skránni.

Hann hevur eisini verið at sæð í Sjónvarpi Føroya, har hann gjørdi átta sendingar saman við einum dreka. Sendingin kallaðist "Rógvi og drekin" og var sera væl móttikin av børnunum.

Men er nakar møguleiki at liva burturav sum gyklari her á landi?

– Nei, tað er eingin møguleiki, slær Rógvi fast beinanvegin.

– Hetta er eitt ítriv sum eg geri í frítíðini. Í Føroyum er tað ikki gjørligt, men eg veit at gyklarar tjena nógv í øðrum londum.

– Her heima fær ein nøkur fá oyru fyri framførsluna, og hesi oyruni brúki eg til at keypa mær triks fyri. So tú sært, at tað er ikki nógvur peningur í at vera gyklari í Føroyum, sigur Rógvi.